

# Oljuprísurin heldur fram at hækka í dag

**Jógvan Hugo Gardar**

15.01.2015 - 14:28

Oljan.fo

Oljuprísurin tykist at hava vent gongdini, og er nú farin at styrkjast aftur. Aftaná nærum samanhangandi lækkingar í prísinum síðani í summar, so kom vend í í gjár, tá prísurin hækkaði við knøppum sjey prosentum.

Norðsjóvaroljan Brent kostaði tá keypsskálarnir stongdu í gjár 49,80 dollarar fatið. Í dag hevur prísurin høkkað javnt, og nú klokkan er farin av tvey liggur prísurin millum 50.50 og 51 dollarar fyri eitt fat av olju.

Fyri einum knøppum tíma síðani kostaði eitt fat av olju 52 dollarar. Tað er fyrstu ferð síðani fyrst í januar at prísurin er farin uppum 52 dollarar.